gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Føroysk skip noyðast at flýggja undan russarum

**– Tað ringasta er, at landsins myndugleikar latast ikki um vón, hóast vit hava gjørt vart við trupulleikan í eini 15 ár, sigur Bjarki Berg, skipari á Bresti. Stóri spurningurin er, hví vit lata russarar sleppa at tíggja sær sum teir vilja undir Føroyum**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

– Nú mugu russararnir, sum fiska Svartkjaft undir Føroyum steðgast. Teir gera so illa ónáðir, at verður ikki okkurt gjørt heilt skjótt, endar tað heilt galið hjá teimum føroysku øllum lemmatrolarunum .

Hvalbingurin, Bjarki Berg, skipari á Bresti, er í døpurhuga um gongdina hjá teimum føroysku lemmatrolarunum, ella djúpvatnstrolarunum, sum teir eisini verða nevndir.

Hann sigur, at tað er serliga framferðin hjá russisku svartkjaftatrolarunum, sum elvir teimum til trupulleikar og sum fær hann at gera vart við seg.

Hann sigur, at hann er ikki einsamallur skipari á djúpvatnstrolara, sum er rættiliga argur inn á teir russisku svartkjaftatrolararnar, sum fiska undir Føroyum.

– Framferðin hjá russarunum hevur verið samtaluevni hjá føroysku djúpvatnstrolarunum í nógv ár. Líka síðani miðskeiðis í áttatiárunum, tvs í eini 15 ár, hava vit gjørt myndugleikarnir varugar við, at framferðin hjá russarunum kann ikki góðtakast.

– Men tað rigasta av øllum er, at hetta hevur verið sum at sláa í eina dýnu, tí myndugleikarnir lata ikki við seg koma.

Avleiðingin av tí er, at russarnir framvegis sleppa at tíggja sær sum teir vilja, uttan at føroyingar tala at.

– Og nú hava teir gjørt umstøðurnar hjá føroysku lemmatrolarunum so ótolandi, at tað verður skjótt, at tað yvirhøvur ikki loysir seg hjá okkum at loysa frá kei.

## Noyðast at flýggja

Bjarki Berg sigur, at tað er óteljandi dømi um, hvussu russiskir svartkjaftatrolarar gera teimum føroysku djúpvatnstrolarunum fortreð.

Sjálvur hevur hann drúgvar royndir við djúpvatnstrolara. Hann var fyrst við Niels Paula eitt skifti í 1984 stýrimaður við Niels Paula. Síðani 1987 hevur hann verið undir Føroyum burturav, fyrst var hann avloysari sum skipari og stýrimaður við Steintór. Frá 1989 til 1995 førdi hann Fønix og síðani 1995 hevur hann verið skipari á Bresti.

– Í fyrstuni, djúpvatnsflotin fiskaði undir Føroyum, høvdu vit t.d. eina leið av Munkagrunninum, heilt norður á Fugloyarbanka, har vit kundu liggja í dagavís við góðum fiskiskapi.

– Men so komu nakrir russiskir svartkjaftatrolarar við flótitrolum. Tá ið teir høvdu verið tvær ferðir ígjøgnum økið, bleiv tað so køla svart til fisk, at vit kundu fyri tað bara ligð við kei.

– Sama dømi gjørdi seg galdandi fyri nøkrum árum síðani. Tá høvdu djúpvatnstrolararnir heilt góðan fiskiskap eftir kongafiski vestur av Føroya Banka, vestur á Ytra Banka.

– Nú er púra oyði har fyri kongafisk. Einasta orsøk til tað, eru trolararnir, sum hava fiskað har á leiðini við flótitroli.

Bjarki Berg sigur, at tá ið hann var við Niels Paula sá hann ferð eftir ferð russiskar svartkjaftatrolarar liggja á Fugloyarbankanum.

– Tá ið trolið kom upp, var posin fullur av kongafiski.

Hann sigur, at longu tá gjørdu teir myndugleikarnar varugar við støðuna. Men onki hendi og málið varð bara tagt burtur aftur.

– Nú er sama støða við at taka seg upp vestanfyri Mykines, tí nú eru russarnir eisini komnir hagar at fiska svartkjaft.

Hann sigur, at teir lógu har við Bresti í november og desember og høvdu góðan fiskiskap.

– Men vit noyddust at flýggja undan teimum russisku trolarunum, tí teir eru so nógvir.

Bjarki berg sigur, at har er tóg, sum bara kunnu togast ein veg, tí tað skal snarast fyri heyggjum og fjøllum.

– Tað kom so mangan fyri, at russarar lógu fyri, tá ið vit togaðu og skuldi snara, so at vit noyddust bara at at hála, hóast tógið ikki var komið í meiri enn í helvt.



*– Vónandi lata myndugleikarnir nú eyguni og oyruni upp, tí russisku svartkjaftaskipini undir Føroyum eru so ágangandi ímóti okkum, at tað er ferð eftir ferð, at vit bara noyðast at taka fluktina, sigur Bjarki Berg, skipari á Bresti*

## Trokaðir burtur

Bjarki Berg sigur, at sostatt eru lemmatrolararnir trokaðir burtur av øllum fiskileiðum hesi seinastu árini

– Tað livur ikki kongafiskur longur í økinum av Munkagrunninum og Norður á Fugloyarbankan. Hann hvarv, tá ið russararnir høvdu verið har.

– Nú hava djúpvatnstrolararnir bara eina leið eftir undir øllum Føroyum at fiska kongafisk á, og tað er á Mykinesgrunninum.

– Men nú eru russaranir eisini lagstir á tað økið. Í løtuni eru teir longur suðuri, men svartkjafturin ferðast norðureftir og í heyst verða teir uttan iva aftur vestur úr Mykinesi.

– Har lógu russisku svartkjaftatrolararnir hvønn einasta dag í alt samalt seinasta heyst. Teir vóru millum átta og 11 í tali. Og tað eru ikki hissini trolarar, teir eru sum Norrøna og størri.

– Vit stúra stórliga fyri, at aftur í heyst fara russisku svartkjaftatrolararnir at hertaka alla kongafiskaleiðina vestanfyri Mykines, so at vit heldur ikki í heyst fáa frið har. Hendir tað, fær tann stóri kongafiskurin vestanfyri somu lagnu sum kongafiskurin eystanfyri: Hann verður oyddur av russisku svartkjaftatrolarunum og tað verður til óbótaligan skaða fyri lemmatrolararnar.

## Løgin fiskiskapur

Bjarki Berg sigur, at teir, sum eru við djúpvatnstrolarunum, skilja ikki rættiliga fiskiskapin hjá russisku svartkjaftaskipunum.

– Á 1997 hava teir givið upp, at teir hava fiskað 55 tons av øðrum fiskasløgum, eitt nú av kongafiski. Í 1998 góvu teir upp, at teir høvdu fiskað 162 tons upp og í 1999, góvu teir 66 tons upp. Í hesum uppgerðunum er kongafiskur taldur upp

Men í fjør hava teir givið upp, at teir hava fiskað 2.560,2 tons av kongafiski, umftramt 2.190,9 tons av øðrum fiskasløgum, ella tilsamans 4.751,1 tons av øðrum fiskasløgum.

Skiparin á Bresti sigur, at á einum fundi, sum umboð fyri djúpvatnstrolararnir høvdu við myndugleikarnar, upplýsti ein fiskifrøðingur, at russiskir svartkjaftatrolarar høvdu fiskað yvir 6.000 tons av kongafiski undir Føroyum.

Hetta heldur hann, er enn meiri ørkymlandi at fáa at vita, tí tað samsvarar ikki heilt við yvirlitið, sum hann hevur fingið, og sum vísir, at teir fiskaðu 2.560,2 tons av kongafiski.

– Hetta hava teir ikki loyvi til, tí í veiðiloyvinum hjá teimum stendur, at teir hava loyvi at hava eina hjáveiði upp á 3% av sild.

Bjarki berg skilir ikki, hví myndugleikarnir bara lata standa til, hóast teir ferð eftir ferð eru gjørdir varugir við støðuna.

Men hann sigur, at hjá djúpvatnstrolarunum eru tað nógvir, sum hava illgruna um, at orsøkin til at myndugleikarnir síggja millum fingrarnir við russarunum, er, at teir vilja ikki koma kvotunum hjá teimum stóru, føroysku frystitrolarunum í Barentshavinum í vanda.

– Men skal hetta verða prísurin fyri at varðveita kvotuna í Barentshavinum, er hon dýrt keypt, tí tað einasta, hon kastar av sær, er hýran til manningina. Men tað, sum føroyingar fiska undir Føroyum, eitt nú við lemmatrolarunum, kastar ómetaliga nógv arbeiði av sær, eisini á landi.

Bjarki Berg sigur, at hann skal heldur ikki leggja russarar undir at svika. Men tað eru nógvir á djúpvatnstrolarunum, sum ikki ivast í, at soleiðis, sum russarar bera seg at, fiska teir væl meiri kongafisk, enn teir geva upp

–Russarar hava útgerð sum tekur alt, sum fyri er. Kongafiskur er soleiðis háttaður, at um dagin liggur hann á botni, men um náttina, kemur hann upp í sjógvin.

– Á teimum leiðum, sum russarar nú fiska á, ber ikki til at fiska so reint, at einasta hjáveiðan skal vera 3% av sild.

– Tað passar ikki, tá ið sagt verður, at kongafiskur, toskur og annar fiskur ikki kemur í svartkjaftatrolini.

– Alt, sum er fyri, kemur í trolið. Og tí er tað eisini sjálvsagt, at russarnir fáa nógvan kongafisk, sigur Bjarki Berg.

– Tað gevur heldur ikki eina rættvísa mynd at kanna teir russisku trolararnar um dagin, tí tá kunnu teir fiska nógv reinar, enn teir gera um náttina. Tað rætta er at kanna teir um næturnar, ella at vera umborð í fleiri dagar ísenn.

## Mugu fáa frið

Bjarki berg sigur, at hann vónar, at myndugleikarnir nú lata eygu og oyru upp og lurta eftir teimum, sum fiska.

Men skal djúpvatnstrolarunum verða lív lagað, verður tað heilt einfalt neyðugt at friða leiðina vestanfyri Mykines á grynri vatni enn 340 favnum fyri svartkjaftaskipunum.

– Sleppa vit ikki at varðveita tær leiðirnar í frið, verður tað skjótt, at lemmatrolarnir allir liggja, staðfestir skiparin á Bresti.

– Sum tíðin er liðin, eru vit trongdir burtur allastaðni, har vit áður hava roynt. Nú er leiðin vestan fyri Mykines einasta leið, vit hava aftur og har tað skulu so allir lemmatrolararnir liva av. Tí er tað avgerandi, at vit sleppa at hava hesa leiðina í frið, annars verður tað ikki leingi, áðrenn hesin fiskiskapurin steðgar.

Hann sigur, at lemmatrolarnir royna at fara aðrastaðni av og á, men tað er ongul í reyv hvørja ferð.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur
Nr. 81 • leygardagur • 28. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir hetta vikuskiftið

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | KÍ-GÍ | Petur Hansen |
| 29.04 | HB-B68 | Birgir Sondum |
| 29.04 | VB-FS V | Oddmar Andreasen |
| 29.04 | NSÍ-B36 | Niklas á Líðarenda |
| 29.04 | B71-EB/S | Suni Johansen |

2. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 28.04 | NSÍ-Skála | Regin Egholm |
| 28.04 | HB-ÍF | Eiler Rasmussen |
| 28.04 | LÍF-GÍ | Jón Kári Frederiksen |
| 28.04 | Sumba-B36 | Erling Eysturoy |
| 28.04 | KÍ-TB | Tummas Pauli Olsen |

3. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | KÍ-GÍ | Jógvan A. Jacobsen |
| 29.04 | AB-B68 | Georg N. Rasmussen |
| 29.04 | VB-ÍF | Zoran Mancic |
| 29.04 | Royn-B36 | Petur E. Kjærbo |
| 29.04 | B71-TB | Dagfinn Olsen |

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 29.04 | B36-HB | Tommy O. Jensen |
| 29.04 | KÍ-VB | Lassin Isaksen |

HB-B68:

# Hørð byrjan

**Bæði á Toftum og í Havn rokna tey við einum torførum dysti, tá lagt verður til brots sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað verða allar helst tvey lið í nærum sterkastu uppstilling, sum fara á vøllin í Gundadali sunnudagin. Skulu vit lurta eftir orðunum hjá tveimum av royndastu monnunum hjá báðum pørtum, so er hetta tó eisini neyðugt, tí báðir partar siga seg avgjørt rokna við einum torførum dysti.

Rúni Nolsøe, sum aftur í ár hevur stýrandi leiklutin á miðvøllinum hjá HB, sigur, at hjá teimum eru so at siga allir mans tøkir. Ivamál hevur tó tikið seg upp um Allan Mørkøre, sum fekk ein snudd undir venjing mikukvøldið. Sjálvur helt Allan, at talan møguliga var um eina fipur, og um so er, er hann helst ikki tøkur, og hetta vil sjálvandi vera ein missur fyri liðið. Hinvegin tykjast valmøguleikarnir hjá Ion Geolgeau at vera øktir, nú bæði Hans á Lag og Andrew á Fløtum eru komnir fyri seg aftur, eftir at teir báðir hava verið skaddir við broti í fótinum.

Spurdur um týdningin av dystinum, heldur Rúni, at allir dystir sjálvsagt hava stóran týdning.

- Tað er tó av alstórum týdningi, at vit byrja árið væl, og tú skalt eisini minnast til, at vit taptu heimadystin móti B68 í fjør. Vinna vit sunnudagin, so eru vit í so máta longu trý stig framman fyri árið í fjør, so vit fara so avgjørt eftir sigrinum, sigur HB-liðskiparin.

## Góðan jokara

Hjá B68 er støðan við leikarum á leið hin sama, sum hon var undan fjórðingsfinaluni móti B36 fyri viku síðani. Øssur Hansen, sum er ein av trimum landsliðsleikarum hjá toftamonnunum, segði í øllum førum hósdagin, at talan helst verður um á leið sama lið.

- Súni Fríði er byrjaður at venja aftur, men í løtuni dugi eg ikki at siga, um hann fer at byrja inni sunnudagin, sigur Øssur. Hinvegin viðgongur hann eisini, at um toppskjúttin frá undanfarna ári ikki byrjar inni, so er talan í øllum førum um ein jokara, sum kann vera hentur at hava á beinkinum.

Sum nevnt omanfyri, so vann B68 útidystin móti HB í fjør, men Øssur roknar við, at hesin sigur verður tungur at endurtaka.

- Sum HB tykist vera fyri í løtuni, so verður hetta í øllum førum sera tungt. Vit ætla okkum tó at halda fast um tað stigið, sum vit hava, tá vit fara á vøllin, og so fáa vit at síggja, um tað er møguleiki fyri at taka meira enn tað, sigur Øssur Hansen at enda.

NSÍ-B36:

# Bæði hava virðing

**Bæði liðini vilja hava eina góða byrjan, men ásannað samstundis, at talan verður um ein dyst, sum verður trupul at vinna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað verða tvey lið, sum bæði hava nakað at prógva, ið fara á vøllin í Runavík sunnudagin. Heimaliðið taldist til tíðir í fjør millum tey liðini, sum spældu besta fótbóltin í landinum, og millum annað vórðu teir í onkrum blað skrivaðir at hava »oddalið á la plukfisk« sum lívrætt. Við hesum varð sjálvandi sipað til tær ferðirnar, tá teir hølvaðu øll oddaliðini í 1. deild av.

## Meira støðugt

Trupulleikin var tó, at avrikini als ikki vóru nóg støðug, og í Runavík ásanna teir eisini, at hetta er nakað, sum skal betrast í ár.

Djóni N. Joensen, sum annars hevur eina fortíð í B36, heldur í øllum førum, at hetta eigur at vera fremsta málið í ár.

- Tað nyttar lítið, at vit bara eru uppsettir móti teimum stóru liðunum. Skulu vit í toppin, skal hetta betrast.

Um uppskriftina at koma í oddin heldur Djóni annars, at hon fyrst og fremst er at vinna heimadystirnar og so skava nakað saman á útivølli, so í so máta er eingin ivi um ætlaninar við dystinum sunnudagin.

- Vit eru sjálvandi sera spentir, nú vit av álvara fara undir kappingarárið, men tað er tó ein sera stór uppgáva, sum vit fáa beinanvegin. B36 verður jú frá nógvum síðum rópt sum størsti favoritturin til at vinna FM. Teir hava gott fólk á øllum plássum, so eingin ivi er um, at hetta verður ein sera harður dystur hjá okkum, sigur Djóni.

## Virðing

Hava runavíkingar virðing fyri B36, so tykist hendan virðingin eisini at virka øvugt.

Jens Kristian Hansen úr B36 sigur í øllum førum, at teir sjálvandi hava virðing fyri runavíkingum. Ikki minst orsakað av avrikunum í fjør og teimum í steypakappingini higartil.

- Eg haldi tó ikki, at vit hava ov stóra virðing, og vit fara so avgjørt at spæla fyri okkara møguleika, sigur landsliðsskiparin.

Eisini B36 hevur nakað at prógva eftir partvíst miseydnaða kappingarárið í fjør. Liðið lág tá leingi í oddinum, men kring summarsteðgin gekk alt galið, og eftir at hava styrkt munandi um liðið í ár, verður nógv kravt av teimum.

Runavíkingar tykjast ikki at hava nakrar skaðar at dragast við, men Jens Kristian sigur, at somikið væl stendur ikki til hjá B36. Ronnie Samuelsen dregist við ein skaða í lærinum, og verður neyvan tøkur. Har afturat er enn ikki greitt, um Magni á Lakjuni fær spælt við. Hann hevur okkurt slag av vøddaskaða í bringuni, og við evstamark okkara var ikki greitt, hvussu verður við hesum.

B36 hevur tó ein breiðan hóp, og Jens Kristian Hansen heldur eisini, at hesin skuldi verið somikið sterkur, at maður kann koma í mans stað.

- Vit fara so á vøllin við ellivu leikarum, og sum sagt, so ætla vit okkum at spæla fyri okkara møguleika. Eisini tá vit vita, at uppgávan er torfør.

VB-FS Vágar:

# Meistararnir eru favorittar

**Dysturin móti FS Vágum skal vinnast, og føroyameistararnir hava eisini nakað at prógva eftir tapið í steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

- Tað er ein dystur sum skal vinnast. Teir koma helst eftir einum stigi, men tað er so upp til okkum at forða teimum í hesum.

Somikið greiður er málverjin hjá VB, Bjarni Johansen, tá vit spyrja hann um vónirnar til fyrsta landskappingardystin hjá VB í ár. Dysturin er móti FS Vágum, sum endaði næst niðast í bestu deildini í fjør, og út frá hesum er lítið at ivast í, at vágbingarnir eru greiðir favorittar í dystinum sunnudagin.

Har umframt hevur VB helst eisini onkran blett at tváa av sær, eftir greiða ósigurin fyri HB fyri viku síðani, og Bjarni ásannar eisini, at teir nú skulu vísa nakað.

- Sjálvur haldi eg tó, at summi eru farin dekan ov illa við okkum eftir tann dystin, men so mugu vit bara vísa, at vit eru betri enn so, sigur málverjin.

Bjarni sigur annars, at teir hava so at siga allar mans tøkar til fyrstu uppgávuna. Undantakið er Gisli Sveinbjørnsson, sum hevur fingið okkurt slag av bruna í knæið. Hinvegin eru bæði Tórður Holm og Jón Pauli Olsen tøkir, og ivaleyst vera teir báðir við frá byrjan sunnudagin. Tórður hevði leikbann seinasta vikuskifti, meðan Jón Pauli júst var afturkomin úr Danmark, og tí mátti taka til takkar við einum plássi á beinkinum tann dystin. Báðir taldust teir í fjør millum stuðulsleikararnar hjá føroyameistarunum, og tí er einki at ivast í, at liðið er styrkt, nú teir báðir tykjast vera 100% til reiðar at tørna út.

Í kappingini um løgmanssteypið vóru VB og FS Vágar í sama bólki, og her vann VB báðar dystirnar. Vesturi í Vágunum ásanna tey eisini, at talan verður um ein sera truplan dyst, men heilt mist mótið hava teir tó ikki.

Tór-Ingar Akselsen, sum mong spáa sum næsta landsliðsleikaran úr Vágum, sigur seg tó ikki hava nakra uppskrift uppá, hvussu teir skulu fáa stig móti meistarunum.

- Eftir tí, sum eg sá í dystinum millum HB og VB, so eru vágbingarnir ikki so sterkir, um teir verða settir undir trýst. Spurningurin er tó, um vit hava liðið til at trýsta teir, so møguliga mugu vit finna upp á okkurt annað, heldur hann.

Akkurát, hvussu hetta skal gerast, dugir hann ikki at siga, men Tór-Ingar vísir eisini á, at felagsliðið í løtuni er illa rakt av skaðum. John Johansen hevur brotið beinið, og harumframt eru bæði Birgir Jørgensen og Jack Johansen ivasamir til dystin, so í álopspartinum eru vágamenn ógvuliga skerdir.

Tað er tó heldur ikki álopspartin, sum gestirnir fara at leggja mest í sunnudagin. Tá vit at enda spyrja um vónirnar til dystin, svarar Tór-Ingar, at um teir fáa eitt stig, so eru teir nøgdir.